# Fiskikapping á Eiðisvatnið

**Leygarkvøldið varð skipað fyri fiskikapping á Eiðisvatnið. Eini 300 sílafiskarar luttóku og vinnarin av kappingini var Nikkel Nielsen, Eiði, við sílinum, sum vigaði 960 gram og var 47 centimetrar**

FISKIKAPPING

*Orð & mynd*
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Eini 300 luttakandi sílafiskarar vóru við Eiðisvatn leygarkvøldið, umframt ein rúgva av øðrum, sum bara vildu hugna sær saman við øðrum í góðveðrinum við Eiðisvatn. Heili níggju húsvognar høvdu funnið vegin niðan á vatnið, umframt at ein rúgva hevði sligið telt upp.

Sjálva fiskikappingina vann Nikkel Nielsen av Eiði. Sílið hann fiska vigaði eitt lítið kilo og var knappliga ein hálvan metur til longdar. Torri Kallsoy varð nummar tvey og Hans Jákup Magnussen varð nummar trý.

Men annað enn sílafisking var eisini á skránni. Felagssangur var og eisini brendu tey bál, og fyrireikararnir lata at, at teir eru væl nøgdir við tiltakið og at øll, sum vóru við vatnið hugnaðu sær ófört.



*Nikkel Nielsen (v.m.) við vinnarasílinum í hondini*


TIL SØLU



mb/ Ronja

Um hóskandi boð fæst,
er mb/ Ronja til sølu.

RING 22 27 00 -og hoyr nærri!



Tryggur og bíligur




STUBBIN Fjarðarvegur 12, Vestmanna
Tlf. 471 800 stubbin@stubbin.fo www.stubbin.fo



STARVSLÝSING

## Handverkari

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi handverkara til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja skjótast gjørligt eftir 21.august 2006. Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

**Arbeiðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum entreprenørmaskinsmiður, maskinsmiður, bilsmiður, lastbilasmiður ella aðra viðkomandi útbúgving.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmálanum ímillum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 16.august 2006.

Merkið brævbjálvan "Umsókn handverkari". Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella Jóhan Hansen smiðjumeistara, á tlf. 540 951.

**Landsverk** er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallarmál, herundir tyrlupallar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5
Postsmoga 78, Tórshavn

Tel 340 800, Faks 340 801
lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

samir.fo



ÚTFERÐ Í STAKKIN



Um viðrar, verður skipað fyri útferð tann 9. og 23. juli kl. 14.00

| | | |
|---|---|---|
| Kostnaður: | Vaksin | 300 kr |
| | Børn | 150 kr |

Tilmelding á telefon
22 18 73 - 42 34 01 - 42 33 57

Stakksnevndin í Tjørnuvík